# Masa vakrastu songrødd

**Tað var Masa Tróndheim, sum hesaferð fór avstað við sigrinum um Føroya vakrastu songrødd. Við songinum hjá Madonnu, "Like a prayer", sang hon seg til fyrstaplássið í kappingini um Ársins songrødd 2003**

ÁRSINS SONGRØDD
*Rúna Sivertsen*



*Masa Tróndheim úr Klaksvík gjørdist vinnari av Ársins songrødd 2003. Hon hevði uppiborið sigurin, siga fyrireikararnir. Sannførandi og sjálvsikkur sang hon seg til eitt fyrsta pláss við sanginum hjá Madonnu, "Like a prayer"*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Masa Tróndheim úr Klaksvík gjørdist vinnari av kappingini um ársins vakrastu songrødd.

Tað var ein spentur áhoyraraskari, sum var samankomin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið. Húsið var fullsett, og lagið var gott.

Rólig og uttan hóvasták kom 25 ára gamla Masa á pallin. Men skjótt vann hon áhoyrararnar og fekk øll við sær, tá hon sang songin hjá Madonnu, "Like a prayer".

### Professionel framførsla

Við nýmótansgjørdu framførsluni av songinum frá 1989, "Like a prayer", megnaði Masa at syngja seg til fyrsta plássið.

Framførsla hennara var professionel, og hon hevur røddina, sum skal til. Hon var sannførandi og sjálvsikkur og sá knæsandi gott út. Hon hevur snøgt sagt alt, sum skal til, fyri at gera seg galdandi innan songverðina.

Tað sá út, sum hevði Masa ikki gjørt annað enn at staðið á einum palli.

Og ikki er sørt, at hon hevur sungið fyri áhoyrarum fyrr.

### Von at syngja

Masa er dóttir Dagny og Gerhard Tróndheim, og í heimi teirra hevur tónleikur og sangur átt eitt stórt pláss.

Pápi hennara sang frá ungum av við bólkinum, sum kallaðist, Kvartettin í Betesda, og mamma hennara hevur sungið í kóri í mong ár.

Í faðirætt hevur hon ætt Undir húsinum í Leirvík, har fleiri kendar songrøddir eru, eitt nú Teitur Lassen, Elin Heinesen og Pætur við Keldu.

Eisini á móðursíðu, sum er abbadóttir Dávur úr Gerðum, finnast góðar songrøddir og tónleikarar.

Hon og systrar hennara hava av og á sungið til veitslur, sum brúdleyp, føðingardagar og onnur tiltøk. Tá hevur pápi teirra oftast havt undirspælið.

Eisini syngur Masa í kóri, og í løtuni syngur hon við kvinnukórinum, Suð í Klaksvík.

### Ovfarin

Sjálv er Masa ovfarin av, at hon gjørdist best. Hon sigur, at hini vóru øll so góð, at hon als ikki hevði væntað sær at vunnið.

- Eg havi altíð ynskt mær at sloppið við til ársins songrødd, men havi ongantíð havt mót ella torað. Men skuldi tað verða, so mátti tað verða nú, áðrenn eg verði ov gomul, sigur Masa.

Masa arbeiðir í løtuni sum avloysari í Norðoya Sparikassa, og seinni í ár byrjar hon í læru har.

Uppundir vikuskifti gjørdist hon forkølað, men hon brúkti heimaráð frá ommu sínari, so røddin kundi verða klár leygarkvøldið.

- Tað var ein einastandandi uppliving at syngja í Mentanarhúsinum. Ljóðklangurin var nógv betur har enn í KÍ-høllini, sjálvsagt, sigur hon.

Masa er ógvuliga glað um fyrsta plássið, men hon loypir ikki uppá báðum beinum, hóast tað. Hon ætlar at taka tingini, sum tey koma, sigur hon.

### Í bankalæru

Nú stendur læran fyri durum, og Masa eigur lítla sonin, Ísak, sum er tvey ára gamal, so nóg mikið er at takast við fyribils.

Umframt tær 10.000 krónurnar, sum var høvuðsvinningur, vann hon eisini eina Rosendal stálskál, sum graverað er í, eina fløsku av sjampanju og eitt Toblerone, sum var um ein metur og vigaði fleiri kilo.

- Men Toblerone sá Masa ongantíð aftur, tað fóru nakrir av ovfarakátu áhoyraranum avstað við, flennir Masa, sum var so glað um sigurin, at hon ikki tímdi at gráta um mistu sjokulátuna.


**HANDILSLÆRLINGUR TIL ÍTRÓTTARHANDIL**

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal nemingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rætti kunnu við bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sportthd@post.olivant.fo


# Ársins songrødd 2003

**Útselt var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið, tá "Ársins songrødd 2003" skuldi finnast. Kappingin millum luttakararnar var jøvn, men tá avtornaði, gjørdist Masa Tróndheim úr Klaksvík nummar eitt. Og tað var væl uppi-borið, siga fyrireikararnir**

ÁRSINS SONGRØDD
*Rúna Sivertsen*



*Tónlistaliga støðið tykist vera hækkandi ár undan ári, siga fyrireikararnir av „Ársins songrødd". Hesaferð vóru 12 luttakarar, sum kappaðust um fyrsta plássið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Sjálvt um verkfall er, settu fyrireikararnir sær fyri, at finalan við „Ársins Songrødd 2003" skuldi vera sum ætlað. Tað vísti seg eisini at vera eitt gott hugskot, tí úselt varð í Mentanar-húsinum í Fuglafirði leygarkvøldið. Bæði foreldur, avvarðandi og hópin av áhoyrarum vóru til staðar, tá ið kappingin byrjaði.

Ljós og ljóð riggaðu til fulnar, og ein sera væluppløgd áskoðarafjøld setti sín dám á tiltakið.

Tað var ein rættiligur gleðisrómur, tá ið tey bæði frásøgufólkini, Jákup Jacobsen og Ragnhild Ellingsgaard, bjóðaðu fyrsta finalistinum upp á pallin. 12 luttakarar sungu seg inn í hjørtuni á teimum nógvu áskoðarunum, og ikki man nakar vera ósamdur, í at øll sungu sera væl.

### Hækkandi tónlistaligt støði

Tónlistaliga støðið tykist alsamt at vera hækkandi á hvørjum ári, og tað kunnu vit sjálvsagt frøast um. Men hetta er ein kapping, og onkur má vinna. Í ár er tað Klaksvík, ið eigur vakrastu og bestu songrødd í Føroyum. Tað úrslit komu teir seks dómararnir, sum rættiliga høvdu eina torføra uppgávu, í hvussu er til.

Sum skilst, var tað serstakliga javnt ímillum nr. 1 og nr.2, men tá ið avtornaði bleiv tað væluppiborið, Mása Trondheim, sum vann kappingina „Àrsins Songrødd 2003".

Nr.2 bleiv Nomi Háberg Hansen úr Havn, og nr.3 gjørdist Óluva Højgaard úr Kollafirði.

Fyrsti vinningur var ein gávukekkur uppá 10.000 krónur. Annar vinningur ein gávukekkur frá „Konto-in" hjá Føroya Banka uppá 5.000 krónur. Triði vinningur var ein gávukekkur uppá 3.000 krónur. Øll hini, ið vóru við í kappingini, fingu eitt gávukort frá Pizza 67.

Tað vóru høvuðsískoytarin, Føroya Banki, Demmus í SMS og Touché á Hálsi, sum stuðlaðu „Ársins songrød 2003".

Fyrireikararnir enda við at takka øllum teimum mongu, sum vóru við í kappingini í ár.

- Vit kunnu øll síggja fram til eina sera spennandi kapping komandi ár, tá ið vit skulu finna ´"Ársins songrødd 2004".




Toll- og Skattstova Føroya Vága øki

# Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hja landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Vága Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki er avloysarastarv, at byrja sum skjótast og 5 mðr fram, svarandi til fulla starvstíð, leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um tollarastarv, hvar arbeitt verður eftir vaktarplani.

Tann sum settur verður, kemur at arbeiða sum tollari og annars fjølbroytt skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur at hava s.s. skrivstovuútbúgving e.l., navigatørútbúgving e.l., hava kunnleika til EDV, og enskt mál, annars at vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiði til rættis.
Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði - kunnleika til EDV er ein treyt - og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðnum. Tað er eisini ein fyrimunur við arbeiðsroyndum innan lóggávuna sum Toll- og skattstovan umsitur.

**Setunarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki **innan 13 juni 2003.**

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Elsu Brimvík, økisstjóra á tlf. 357700.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Vága Øki
380 Sørvágur



**Fiskimálaráðið**
*Aðalskrivstovan*

# Deildarleiðari til Fiskimálaráðið

Í Fiskimálaráðnum verður starvið sum deildarleiðari fyri fíggjar- starvsfólka- og umsitingarstápinum hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Deildin er nýskipað og er bygnaðarliga ein stápseind í Fiskimálaráðnum. Talan er um starv við spennandi avbjóðingum har ein týðandi partur verður at standa fyri menningini av virkisøkinum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
Dagligu leiðsluna av deildini, herundir hava ábyrgd fyri:
- Fíggjar- og roknskaparviðurskiftunum í Fiskimálaráðnum
- Starvsfólkamálum í Fiskimálaráðnum
- Umsitingarmálum í Fiskimálaráðnum
- At samskipa uppgávur, ið eru tvørgangandi ella hava felags endamál innan virkisøkið
- At samskipa felags stevið í innan- og uttanhýsis samskiftinum innan virkisøkið
- Ráðgeva í tvørgangandi málum í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin
- Samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálaráðnum annars

*Førleikakrøv:*
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Duga at samskifa á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Hollan kunnleika til almenna umsiting
- Royndir at umsita fíggjarmál og starvsfólkamál
- Kunnleiki til fíggjar- og búskaparskipan landsins er ein fyrimunur
- Kunnleika til edv skipanir
- Leiðsluroyndir
- Góð samskiftisevni og hegni at fyriskipa
- Duga væl við fólki

*Setanartreytir:*
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært avtalu millum avvarðandi yrkisfelasg og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Aðalskrivstovan.

Starvsheitið er deildarleiðari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

*Umsóknir:*
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinsta lagi mánadagin 16. juni 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.*



**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

# Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

Sosialurin 341800



**BOSCH**
**Makita**



Á goymslu eru allar Bosch og Makita maskinur bæði til ídnað og léttari arbeiði

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn - Tlf. 313442



# Aðalfundur

Epileptikarafelag Føroya hevur ársaðalfund í MBF-húsinum,Íslandsvegur 10

**12. juni kl. 19.00.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo